# Veva eina mynd



NÁM TJ2019 Skeið í handarbeiði Tóra Joensen og Sára Mrdalo

**Tilfarslisti:**

Myndavevur

Tráð at seta í vevin

Tógvrestir í ymiskum litum og av ymiskum slagi

Langa nál

Kamb ella okkurt líknandi

Bretti at festa myndina á

Máling og glimmur at prýða brettið við

Smáar seymir at festa myndina við

Metal-tríhyrinig



**Mannagongd:**

1. Set tráð í vevin





2. Hekkla ein kant umleið 5 cm inni á vevinum soleiðis: Byrja við at leggja tógvið undir træðrirnar á vevinum og hála í tógvið so at umleið 50 cm hongur uttanfyri vevin (á mótsattu síðu).



Ger eina lítla lykkju. Byrja at hekkla luftmaskur millum hvønn tráð við at stinga hekklinálina niður eftir tráðnum, sum liggur undir, og hekkla hann gjøgnum lykkjuna.



Til seinast verður tráðurin/tógvið drigið ígjøgnum luftmaskuna.



3. Byrja síðan at veva myndina. Vel litir og slag av tógvi. Klipp eitt stykki av tógvi og veva millum træðrirnar. Aðru hvørja ferð skal nálin vera **omanfyri** tráðin og aðru hvørja ferð skal nálin fara **undir** tráðin soleiðis:



4. Tað ber til at byrja við nýggjum liti mitt í myndini. Legg tó merki til, at tá er best at venda og veva yvir somu træðrir, fyri at fáa tað at ganga upp.



Halt áfram at veva. Nú er tað bert hugflogið sum setur mørk.



Eisini ber til at snara tógvið um nakarar træðrir, og síðan halda áfram at veva:



Veva til tað eru umleið 6 cm til endan av træðrunum.

4. Hekkla ein kant, eins og í byrjanini. Klipp træðrirnar tætt at naglunum sum til ber.



5. Fest endarnar.



6. Mála brettið og stroy glimmur á, áðrenn málingin er tornað.



Legg myndina á brettið og fest hana við annaðhvørt

- at límii hana ella

- at smíða myndina smáum myndina, soleiðis at hon er fest á brettið.



7. Vend brettinum á og smíða eitt metal-tríhyrning á baksíðuna til at heingja myndina upp við.

